tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 95 leygardagur 20. mai 1995 69. árgangur Krónur 7,00



*Fyrrv. føroyskur bankamaður:*

## Avskrivið helvtina av kommunuskuldini

síða 10-11

## UPPTAKTIN

**Lesið um allar teir komandi dystirnar**

síða 14 & 15

*Góð tíðindi úr Irmingarhavinum:*



## Oyrnafjall siglir heim við fullari last av kongafiski

*Roknað verður við nógvur arbeiði á Tvøroyri í næstum*

síða 3



*Forsetin í Armerada Hess vitjar okkum:*

## Trýr uppá Føroyar

síða 2

Tíðindablaðið **sosialurin**

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkustjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Tórfinn Smith - Hilmar Jan Hansen - Justinus Eidesgaard

Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr.: Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

# Ørska

## *Oddagrein*

FLEIRI flakavirki standa tóm, tí Fiskavirking heldur ikki grundarlag vera fyri at lata tey upp. Hetta er tungt hjá fólki at góðtaka og støðan kann kanska skiljast, um hugsað verður um rávørugrundarlagið og kostnaðin av at keypa inn rávøru. Men samstundis frættist, at menn í eitt nú Sandoynni og í Lorvík, ið hava ítøkiligar ætlanir um at nýta flakavirkini í hesum bygdum til nýggjar framleiðslur, ikki kunnu fáa virkini til leigu. Fiskavirking vil ikki hava kapping og tykist vilja heilgardera seg í forhond.

HETTA lagið kann ikki halda fram. Tað fer ikki at bera til, at góð virki verða standandi tóm og menn, felagsskapir og kommunur við bæði kapitali og góðum hugskotum verða forðað í at sleppa til verka. Støðan er sum kunnugt so desperat, at í aðrari bygdini hótta stigtakararnir við at byggja virki undir liðini av verandi virki og í hinari bygdini hóttir bygdaráðið við at bygningarnir skulu takast niður fyri síðan at verða bygdir uppaftur á sama staði. Hetta kemur alt fyri sum ørska og nú má spyrjast, um vit yvirhøvur ongan politikk hava fyri fiskiídnaði á landi. Fólk spyrja, um veruliga alt verður gjørt, sum gerast kann fyri at útvega rávørur og fyri at finna nýggjar framleiðslur og nýggjar marknaðir. Svar fæst einki, ljós hómast einki, bert orð, orð og aftur orð. Fiskavirking gjørdist einki lokomotiv og øll tey nýggj átøkini, ið skuldu koma úr Tinganesi, tykjast horvin upp í ta bláu luft og fólkið framvegis í vinnuloysi. Vit kundu lagt afturat, at tann viðferð, tey fáa, sum tykjast vilja royna nakað, frá myndugleikum, peningastovnum og Fiskavirking kann ikki virka eggjandi uppá initiativ og virkisfýsni.

TAÐ ber til at útvega rávøru. Tað ber til hjá øðrum, so má tað eisini kunna bera til her hjá okkum. Men her manglar samskipan, samstarvsvilji og her mangla vinnupolitikkur, politiskur góðvilji, eggjan og íblástur. Her hendir snøgt sagt einki og mismótið breiðir seg alt meira í fólkinum. Nú má landsstýrið taka sær um reiggj og leggja fram ein heildarpolitikk við tí endamáli at fáa fólk aftur í arbeiði. Meðan vit bíða eftir hesum politikki, kann landsstýrið í hvussu so er kalla Fiskavirking til ordan, so vit sleppa burtur úr hesari absurdu støðu, sum valdar eitt nú í Lorvík og á Sandi.

MONOPOLSTØÐA krevur ein sera høgan vinnumoral og stóra ábyrgd av monopolhavaranum. Fiskavirking er í monopolligari støðu og tykist fáa alt fleiri av teimum ónollum, ið eyðkenna monopolini. Hetta kann almenningurin, ið hóast alt eigur Fiskavirking, ikki góðtaka og tí má nakað henda her og nú.

*Sosialurin*



*Tummas Arabo, stjóri á Strandferðsluni heilsar upp á topparnar í Amerada Hess, Laidlaw og Hardmann. Mynd kalmar*

*Forsetin í Amerada Hess vitjar*

# Virksemið fer at bera ávøkstur

*-sjálvt um tit ikki finna olju*

-Vit eru komnir til Føroya fyri at siggja landið og hitta fólkið her buleikast. Tað halda vit er umráðandi, nú vit trúgva upp á, at eitt oljuvirksemi fer at taka seg upp her.

Hetta sigur Richard Hardmann, ein av stjórunum í stóra amerikanska oljufelagnum Amerada Hess, sum vitjar í Føroyum í hesum døgum saman við varaforsetanum í oljufyritøkuni, Laidlaw.

Laidlaw er júst ávegis til New York, har hann í komandi viku skal taka við forsetasessinum í Amerada Hess.

Amerada Hess er ein av teimum mest virknu oljufeløgunum vestan fyri Hetland og er við í fleiri av oljukeldunum, sum eru funnar har, eitt nú Clair, Schihallion, Solan og Strathmore.

Richard Hardmann sigur við Sosialin, teir eru áhugaðir í tí føroyska økinum og fara í næstum at keypa seismisku upptøkurnar frá Western saman við trimum øðrum oljufeløgum, Norsk Hydro, Dong og Lasmo.

Hardmann sigur, at føroyingar eiga at vita, at soleiðis sum gongdin er nú, so fer virksemið í sambandi við oljuleitingina at leggja pengar eftir seg í føroyska samfelagnum, sjálvt um eingin olja verður funnin.

Amerada Hess hevur flest lisensir í Norðsjónum og stendur fyri triðstørstu framleiðsluni eftir BP og Shell.

Hardmann sigur, at teir hava fingið tillutaðar 8 blokkar í 16 rundu vestan fyri Hetland, sum júst er almannakunngjørd.

-Vit eru hugaðir at gera kanningar í føroyskum øki, og tað skal ikki vera nøkur loyna, at vit leita eftir heilt stórum oljukeldum.

Tað er neyðugt við stórum oljukeldum, um tað skal løna seg at fara undir tær stóru íløgurnar í hesum nýggja økinum sigur Hardmann.

Teir høvdu í gjár fund við Føroya Oljuídnað og við oljuráðleggingarnevndina.

jan

**Hús í Klaksvík**

Húsini Undir Fossi 47, 12x14 alin, 2 hæddir innrættaðar, hjallur og bilhús - til sølu.

Tlf. 55367

**TILBOÐ til FISKARÍMESSUNA í Bellacentrinum**

**BÍLEGGIÐ NÚ!**

**Enn eru nøkur pláss eftir...**

**7-11/6 Gist verður á Hotel DAN**

| | |
|---|---|
| Kostn. fyri hv. á dup. kamari | **3.425,-** |
| Kostn. fyri hv. á eink. kamari | **4.075,-** |

**Íroknað prísin er:**

- Ferðin báðar vegir og ferðaavgjaldið
- Innivist á Hotel Dan í 4 nætur
- Morgunmatarbuffet
- Møguleiki fyri transfer til flogvøllin á veg heim

Hotel Dan er fyrsta flokks hotell, sum liggur einans 4 km frá Bellacentrinum.
Ynskja tit at ferðast aðrar dagar, setið tykkum í samband við okkum og vit finna eina loysn.

**Ring 1.5900 og bið um flogdeildina.**

*Flogferðaseðlar um allan heim*

SMYRIL LINE - títt ferðasamband við útheimin

J. Broncksgøta 37

TLF. 15900